24. oktober 2011

KT-keypsatburður

millum almennar og privatar KT-keyparar

Ískoyti til frágreiðing frá 2007

KT-felagið

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

“Wealth is actually created at the microeconomic level of the economy, rooted in the sophistication of actual companies as well as in the quality of the microeconomic business environment in which a nation´s firms compete.

If the local business environment does not become more efficient and local companies do not improve their productivity and sophistication, then market opening will boost imports, while growth in exports and the attraction of foreign investment will be painfully slow. Improvement in the microeconomic business environment begins before market opening measures are complete.

The sophistication of home demand derives in part from regulartory standards, consumer protection laws, government purchasing practices, and openness to imports."

Michael E. Porter, Harvard University
Building the Microeconomic Foundations of Prosperity

Samandráttur

Í 2007 varð løgd fram ein ætlan fyri føroyska KST-vinnu, sum lýsti, hvørji neyðug stig skuldu takast fyri at menna og stimbra føroyska KST-vinnu. Hetta ískoytið fer eitt stig víðari. Fyri at hava eina blómandi KST-vinnu er neyðugt, at góðskan á búskaparliga vinnuumhvørvinum, sum KST-fyritøkurnar búleikast í, er góð.

Fyri at betra um góðskuna á vinnuumhvørvinum eru trý viðurskifti raðfest. Tey eru (i) gott undirstøðukervi, (ii) stimbrandi eftirspurningur og (iii) styrkin og samstarvið í KST-vinnuni.

Gott undirstøðukervi

Undirstøðukervið er væl betrað við KT útbúgvingini á Fróðskaparsetrinum, tó tekur Fróðskaparsetrið bert næmingar inn annaðhvørt ár, og mælt verður til, at Fróðskaparsetrið fer at taka næmingar inn hvørt ár. Mælt verður til, at útbúgvingin verður víðkað til eisini at vera ein master-útbúgving.

Mælt verður til, at ein serfrøðinga-skipan verður sett í gildi í Føroyum. Henda skal lokka serfrøðingar til Føroya við skattalætta soleiðis, at KT-vinnan kann fáa fatur á starvsfólki við hollum KT-førleika, sum kann stimbra føroysku KT-vinnuna. Tað skal vera møguligt hjá KT-vinnuni at innflyta KT-frøðingar úr øllum heiminum uttan forðingar.

Mælt verður somuleiðis til, at føroyskir KT-frøðingar, sum arbeiða uttanlands fyri føroyskar KT-fyritøkur, fáa ein dagfrádrátt, meðan teir arbeiða uttanlands í longri tíðarskeið. Hetta fer at gera tað lættari hjá KT-vinnuni at varðveita KT-frøðingar og fer at stimbra KT-vinnuni at bjóða uppá útlendskar uppgávur og harvið økja um útflutningin.

Stimbrandi eftirspurningur

Hetta ritið snýr seg fyrst og fremst um at skapa ein strimbrandi eftirspurning eftir KT. KT-felagið ynskti at kanna, um innflutningurin av KT-tænastum økist. Serliga seinastu

hendingarnar við, at føroyskir peningastovnar útveittu KT-tænastur til Danmarkar. Hagtøl frá Hagstovuni og Gjaldsstovuni eru savnað fyri at kortleggja føroyska eftirspurningin eftir KT.

Almennu hagtølini vísa, at innflutningurin av KT-tænastum veksur skjótari enn sølan av KT í Føroyum. Frá 2005 til 2008 vaks sølan í Føroyum við 36%, meðan innflutningurin vaks 84%.

Privati geirin í Føroyum innflytur meira av KT-tænastum enn almenni geirin. Innflutningurin hjá tí privata geiranum er hækkaður meira enn 100% hetta tíðarskeiðið, meðan innflutningurin hjá tí almenna hevur hækkað hetta tíðarskeiðið við 46%.

Føroyski marknaðurin keypir tó fyri tað mesta føroyskt. Meira enn 80% verður keypt í Føroyum. Effektivi eftirspurningurin er 290 mió. kr., harav eigur tað almenna 32% og tað privata 68%. Innflutt verður fyri 48,3 mió. kr. um ári, sum er potentialið hjá KT vinnuni. Av hesum er almenni parturin 27%, meðan privati er 73%.

Almennu hagtølini vísa, at privati geirin keypir meira og meira útlendskt, tó hagtølini eru bert fram til og við 2008. Sostatt vísa tey ikki, hvussu innflutningurin hevur verið síðani. Tí var neyðugt at gera eina spurnarrundu millum føroyskar KT-keyparar.

Undirtøkan var løk. Bert 8 spurnarbløð vórðu svarað, og umboðaðu hesi 18% av KT-marknaðinum. Hvørt útveitingin av KT-tænastum hevur havt ávirkan á innflutningin av KT ber ikki til at staðfesta, av tí at eingin peningastovnur veitti hagtøl fyri 2010. Spurnarbløðini undirbygdu almennu hagtølini.

Tað hevur týdning, at politiski myndugleikin stimbrar serligan KT eftirspurning í Føroyum. Tað almenna hevur skrivað nýggjan útbjóðingarpolitikk og hevur tí amboðið til at gjøgnumføra regulerandi standardir.

Fyri at føroyska KT-vinnan skal standa seg í kappingini við KT-veitarar úr øðrum londum, skal vinnuumhvørvið í Føroyum hava høga góðsku, sum gevur KT-vinnuni førleika og kappingarføri.

Í Føroyum eru bara smáar og miðalstórar KT-fyritøkur, og innkeypspolitikkurin eigur at taka hædd fyri, at hesar fáa veruligan møguleika at vera við. Hetta merkir, at stórar verkætlanir skulu býtast upp í partar – eitt nú eftir nøgd, landafrøði og vørubólkum.

KT-felagið mælir til sum meginreglu, at nýggjar føroyskar KT-skipanir vera bjóðaðar út.
Sum meginregla eigur tað almenna at brúka føroyskar KT-fyritøkur sum høvðusveitarar til sínar uppgávur. Um ein útlendsk fyritøka fær eina almenna KT-uppgávu, eigur tað almenna at seta sum meginreglu, at føroyskir undirveitarar vera brúktir fyri áhaldandi at førleikamenna føroyska KT-vinnu.

Styrkin og samstarvið í KT-vinnuni

Føroyska KST-vinnan hevur konsoliderað seg nógv síðstu árini. Í dag eru bert 5 fyritøkur, sum standa fyri 96% av KST-vinnuni. Samanvið Fróðskaparsetrinum er eitt tyssi við at verða skapt. KT keyparar, KT-vinna og Fróðskaparsetrið kunnu við tíðini verða tengd at hvørjum øðrum og vera sínámillum ávirkaði við sínum serligu kjarnu- og stuðulsførleikum.

Í Føroyum fer kanska at bera til at skapa eitt tyssi, sum hevur høgan førleika at framleiða einastandandi KT-tænastur til lítil lond ella avmarkaðar landafrøðiligar eindir.

Um ein útlendingur fær eina almenna KT-uppgávu, sum nevnt omanfyri, har tað almenna hevur sett sum krav, at føroyskir undirveitarar skulu veljast, kann tyssið brúkast. Hetta merkir, at KT-vinnan skal samstarva fyri at megna at vera undirveitari til útlendskar KT-skipanir í Føroyum.
KT–felagið mælir til, at tættari samstarv fæst millum hesar aktørar við tí í hyggju at fáa skapt tyssuførleika innan júst hesa vinnu.

KT-vinnan hevur í dag eina stødd, sum kann vera eitt eyka bein hjá føroyska búskapinum at standa á. Hon kann gerast ein vakstrarvinna, sum skapar búskapar-

vøkstur og íverksetan/innovatión. Hetta kann vera orsøkin til, at fólk við góðum útbúgvingum og høgum førleika flyta heim til Føroya. Við hesum økist fólkatalið í Føroyum og harvið virðisskapanin og livistøðið.

Tilmæli

Her er ein samandráttur av tilmælum hjá KT-felagnum

Tilmæli 1: Mælt verður til, at Fróðskaparsetrið fer at taka næmingar inn hvørt ár. Mælt verður til, at útbúgvingin verður víðkað til eisini at vera ein master-útbúgving.

Tilmæli 2: Mælt verður til, at ein serfrøðinga-skipan verður sett í gildi í Føroyum, sum lokkar serfrøðingar til Føroya við skattalætta. Tað skal vera møguligt hjá KT-vinnuni at innflyta KT-frøðingar úr øllum heiminum uttan forðingar.

Tilmæli 3: Mælt verður til, at føroyskir KT-frøðingar, sum arbeiða uttanlands fyri føroyskar KT-fyritøkur, fáa ein dagfrádrátt, meðan teir arbeiða uttanlands í longri tíðarskeið.

Tilmæli 4: Mælt verður til sum meginreglu, at nýggjar føroyskar KT-skipanir vera bjóðaðar út.

Tilmæli 5: Mælt verður til, at tað almenna sum meginreglu brúkar føroyskar KT fyritøkur sum høvðusveitarar til sínar uppgávur. Um ein útlendsk fyritøka fær eina almenna KT uppgávu, eigur tað almenna at seta sum meginreglu, at føroyskir undirveitar vera brúktir.

Tilmæli 6: Mælt verður til eitt tættari samstarv millum stórar KT-keyparar, Fróðskaparsetrið og KT-vinnuna við tí í hyggju at fáa skapt tyssuførleika.

Innihald

1. INNLEIÐING 7

1.1 GÓÐSKAN Á VINNUUMHVØRVINUM 8

1.2 TRUPULLEIKAORÐING OG BYGNAÐUR AV FRÁGREIÐING 9

2. HAGTØL 10

2.1 SAMSKIFTISVINNAN FRÁSKILD 10

2.2 EFFEKTIVI EFTIRSPURNINGURIN 10

2.3 ALMENT KEYP 13

3. SPURNARKANNING 15

3.1 HAGTØL FYRI KT-NÝTSLU 15

3.1.1 Hagtøl fyri privata KT-nýtslu 17

3.1.2 Hagtøl fyri almenna KT-nýtslu 18

4. KT-KEYPSATBURÐUR 19

4.1 STIMBRANDI EFTIRSPURNINGUR 19

5. KST-TYSSI 21

6. KELDUR 25

7. FYLGISKJAL 26

1. Innleiðing

Í 2007 varð ein ætlan fyri føroyska KST-vinnu skrivað og løgd fram. Frágreiðingin var ein roynd at lýsa umstøðurnar føroyska KST-vinnan búleikaðist í, og hvørji neyðug stig skuldu takast fyri at menna og stimbra føroyska KST-vinnu.

Í stuttum kann sigast, at fyri at hava eina blómandi KST-vinnu, er neyðugt, at KT-fyritøkurnar eru kappingarførar, og at góðskan á búskaparliga vinnuumhvørvinum, sum KT-fyritøkurnar búleikast í, er góð.

KT-fyritøkurnar verða kappingarførar, um tær megna at vinna kappingina orsaka av framúrgóðum ella serligum KT-loysnum og KT-tænastum heldur enn at sova á komparativum fyrimunum, so sum bíligari arbeiðsmegi og tað at liggja nær keyparanum í einum fjarskotnum oyggjasamfelag.

Góðskan á búskaparliga vinnuumhvørvinum, sum KT-fyritøkur búleikast í, er góð, (i) um atgongdin til KT-frøðingar og KT-gransking er nøktandi, (ii) um samspælið í KT-vinnuni er mennandi, og (iii) føroyski eftirspurningurin eftir KT er stimbrandi og avbjóðandi.

Fyri at røkka bæði einari kappingarførari vinnu og einari góðari góðsku á vinnu-umhvørvinum vóru 3 høvuðstilmæli sett fram í seinastu frágreiðing.

Høvuðstilmælini í frágreiðingini vóru (i) at KT-útbúgving og KT-gransking skuldu setast á stovn á Fróðskaparsetrinum, (ii) at KST-vinnan fekk veruligan møguleika at bjóða uppá almennar føroyskar KST-verkætlanir og (iii) at KST vinnan fekk lætta atgongd til KT-frøðingar.

Fyrsta tilmælið er rokkið, tí ein KT-útbúgving er sett á stovn á Fróðskaparsetrinum. Tó tekur Fróðskaparsetrið bara næmingar inn annaðhvørt ár. Tilmælt verður, at Fróðskaparsetrið tekur næmingar inn hvørt ár, og at skipanin verður víðkað til eisini at fevna um eina master-útbúgving.

Somuleiðis var triðja tilmæli rokkið, tí lættari var at seta m.a. KT-frøðingar úr ES-londum í starv. Hetta var tó bert galdandi so leingi arbeiðsloysið var minni enn 3,5%. Nú er arbeiðsloysið hægri, og tí er hendan skipan dottin niður fyri.

Frágreiðingin frá 2007 staðfesti, at samfelagið hevur tørv á KT-frøðingum, og at føroyskar fyritøkur hava sera torført við at finna skikkaðu arbeiðsmegina. Ein háttur at eggja fremmandum KT-frøðingum til Føroya er at bjóða teimum eina serfrøðinga-skipan. Serfrøðinga-skipanin skal vera galdandi breitt fyri allar serfrøðingar – ikki bert innan KT.

Mælt verður til, at sett verður á stovn ein serfrøðinga-skipan, sum veitir fremmandu serfrøðingunum skattalætta. Tað skal vera møguligt hjá KT-vinnuni at innflyta KT-frøðingar úr øllum heiminum uttan forðingar.

Mælt verður eisini til, at føroyskir KT-frøðingar, sum arbeiða uttanlands fyri føroyskar KT-fyritøkur, fáa ein dagfrádrátt, meðan teir arbeiða uttanlands í longri tíðarskeið. Hetta fer at gera tað lættari hjá KT-vinnuni at varðveita KT-frøðingar og fer at stimbra KT-vinnuni at bjóða uppá útlendskar uppgávur og harvið økja um útflutningin.

Tilmælið viðvíkjandi veiting til tað almenna var ikki nevnivert viðgjørt í seinastu frágreiðingini frá 2007, og tí fer hetta ískoytið til frágreiðingina at snúgva seg um stimbrandi eftirspurning.

Hesin spurningur verður eitt sindur víðkaður við tað, at veitingar til stórar privatar fyritøkur eisini verða viðgjørdar. Orsøkin til hetta er, at føroyskir peningastovnar hava útveitt KT-veitingina til Danmarkar, sum er ein ábending um, at keypsatburðurin hjá tí privata er broyttur.

1.1 Góðskan á vinnuumhvørvinum

Um føroyska vinnuumhvørvið ikki verður meira effektivt, og føroyskar fyritøkur ikki betra sín produktivitet og sítt kappingarføri, fer ein opin marknaður sum tann føroyski

at stimbra um innflutning, meðan vøkstur í útflutningi og tillokkan eftir útlendskum íløgum í Føroyum fer at ganga seint.

Fyri at betra um góðskuna á vinnuumhvørvinum, sum KT-fyritøkur búleikast í, eru trý viðurskifti raðfest. Tey eru (i) gott undirstøðukervi, (ii) stimbrandi eftirspurningur og (iii) styrkin og samstarvið í KT-vinnuni.

Undirstøðukervið er væl betrað og varð viðgjørt í seinastu frágreiðing. So í hesari verður hugt eftir, um eftirspurningurin í Føroyum er stimbrandi. T.v.s. at savnað verða hagtøl fyri, hvussu nógv verður keypt í Føroyum, og hvussu nógv verður keypt uttanlands. Síðani verður hugt eftir bygnaðarbroytingum seinastu árini á KT-marknaðinum, sum skal geva eina ábending um styrkina og samstarvið í vinnuni.

1.2 Trupulleikaorðing og bygnaður av frágreiðing

KT-felagið hevur ta fatan, at innflutningurin av KT-tænastum økist. Fyri at staðfesta um so er, fer kapitul 2 at snúgva seg um hagtøl. Tøk hagtøl verða savnað frá Hagstovuni og Gjaldsstovuni. Út frá hesum ber til at kortleggja eftirspurningin eftir KT í Føroyum. Staðfest verður, um eftirspurningurin verður nøktaður sum innflutningur ella sum føroysk framleiðsla.

Hagtølini verða bygd út við einari spurnarkanning millum almennar og privatar innkeyparar av KT. Greitt verður frá spurnarkanningini í kapitul 3. Spurnarkanningin skal vera við til at styrkja um almennu hagtølini viðgjørd í kapitul 2.

Kapitul 4 viðger keypsatburðin hjá føroyskum KT-keyparum. Kapitul 5 greiðir frá, hvussu nógv bygnaðurin í KT-vinnuni er broyttur seinnu árini, og hvat úrslit kann spyrjast burtur úr tí.

2. Hagtøl

Endamálið við hesum kapitli er at kortleggja effektiva eftirspurningin eftir KT í Føroyum og út frá tí staðfesta, um tað almenna og stórar føroyskar fyritøkur keypa KT úr útlondum ella í Føroyum.

2.1 Samskiftisvinnan fráskild

KST-vinnan verður vanliga býtt uppí KT-vinnu og samskiftisvinnu. Samskiftisvinnan verður fráskild og verður ikki viðgjørd í hesari frágreiðing. Orsøkin er, at samskiftis-vinnan eru Føroya Tele og Vodafone, og hesar fyritøkur hava eina góða marknaðarstøðu í Føroyum og hava ikki trupulleikar av, at tað almenna ella stórar privatar fyritøkur ikki keypa føroyskt. Talva 1 niðanfyri vísir samlaðu søluna á samskiftismarknaðinum og vísir samtíðis, hvussu lítlan part av søluni, tað almenna keypir. Sostatt hevur almennur keypspolitikkur ongan týdning fyri samskiftisvinnuna.

Talva 1. Søla og alment keyp av samskifti

	2005	2006	2007	2008	2009
Søla samskifti	330.244	366.078	381.747	382.761	356.179
- Gongd		11%	4%	0%	-7%
Alment innkeyp	14.747	14.752	16.240	17.809	16.417
- Gongd		0%	10%	10%	-8%
Almennur partur	4%	4%	4%	5%	5%

Kelda: Vinnuvitan.biz (søla) og Gjaldstovan (alment innkeyp)

Talva 1 vísir, at tað almenna keypir bert áleið 5% frá samskiftisvinnuni. Sostatt hevur keypsatburðurin hjá tí almenna ongan týdning fyri samskiftisvinnuna. Samskiftisvinnan verður ikki viðgjørd meira í sambandi við hesi hagtøl.

2.2 Effektivi eftirspurningurin

Hagtølini, sum lýst eru niðanfyri, eru frá hagtalsgrunni Hagstovunnar. Har verður ávíst, hvussu stór sølan er í KT-vinnuni. Somuleiðis eru hagtøl fyri innflutning og útflutning

av KT-tænastum. Ikki ber til at finna innflutning av KT-útbúnaði, tí hann er blandaður saman við innflutningi av skrivstovuútgerð.

Hagtøl fyri alment innkeyp og almennan innflutning av KT eru til taks hjá Gjaldsstovuni. Har eru tølini býtt upp í KT-tænastur, KT-útbúnað og KT-menning. Sostatt ber til at leggja tølini fyri almenna innflutningin av KT-útbúnaði afturat effektiva eftirspurninginum. Antikið verður, at í tølunum fyri innflutning av KT-tænastum er KT-menning íroknað.

Talva 2 vísir, at effektivi eftirspurningurin er 290 mió. kr. Seinastu tølini eru frá 2008, so tølini eru nakað gomul. Tó finnast ikki nýggjari tøl. Orsakað av altjóða fíggjarkreppuni eru tølini fyri 2009 og 2010 allarhelst lægri.

Effektivi eftispurningurin er tó ikki heilt rættur, tí eingi tøl finnast fyri innflutning av útbúnaði fyri tað, sum privatar fyritøkur (KT-fyritøkur ikki íroknaðar) hava innflutt.

Talva 2. Effektivur eftirspurningur

	2005	2006	2007	2008
Nettosøla í Føroyum	176.865	212.856	253.922	241.006
Innflutningur KT-tænastur	26.200	33.300	42.300	48.300
Útflutningur KT-tænastur	3.500	3.900	1.900	3.300
Almennur innfl. útbúnaður	4.393	14.109	6.501	4.829
Privatur innfl. útbúnaður	?	?	?	?
Effektivur eftirspurningur	203.958	256.366	300.823	290.835
Almennur partur	39%	36%	31%	32%
Privatur partur	61%	64%	69%	68%

Kelda: Hagstovan, Gjaldsstovan. Almennur partur er bert landið. Kommunur eru ikki við.

Tað, sum KT-fyritøkur hava innflutt er við í tølunum fyri nettosølu í Føroyum, tí KT-fyritøkurnar hava selt tað, sum tær hava innflutt, útaftur. Hugsast kann tó, at stórar privatar fyritøkur, so sum tryggingarfeløg ella peningastovnar, hava innflutt útbúnað beinleiðis úr útlandinum. So effektivi eftirspurningurin, ella við øðrum orðum,

marknaðurin fyri KT í Føroyum, er eitt sindur hægri enn 290 mió. kr. Tó hvussu nógv størri ber ikki til at gita um.

Talva 2 vísir, at í 2008 hevur tað almenna staðið fyri 32% av marknaðinum fyri KT, meðan tað privata hevur keypt 68%.

Talva 3. Býtið av innflutningi av KT-tænastum

	2005	2006	2007	2008
Innflutningur KT-tænastur	26.200	33.300	42.300	48.300
Innflutningur almenna	9.100	11.325	12.455	13.272
Innflutningur privat	17.100	21.975	29.845	35.028
Almennur partur	35%	34%	29%	27%
Privatur partur	65%	66%	71%	73%

Kelda: Hagstovan, Gjaldsstovan: Egnar útrokningar

Talva 3 vísir innflutning av KT-tænastum. Antikið verður, at KT-menning er íroknað. Tað, sum ikki er við, er KT-útbúnaður.

Talva 3 vísir, at privati parturin er nógv tann størri parturin, og hann veksur sum árini líða. Í 2008 var almenni parturin 27%, meðan tann privati var 73%. Tað er serliga KT-tænastur (herundir menning), sum KT-felagið er áhugað í at vita nakað um, og talva 3 er eitt prógv fyri, at tað privata keypir lutfalsliga meira og meira útlendskt, meðan tað almenna lutfalsliga meira og meira keypir føroyskt. Tó eru hesi tøl bert fram til 2008.

Út frá talvu 3 ber til at staðfesta, at potentialið hjá føroysku KT vinnuni eru 48,3 mió. kr., um hon heldur framleiðir hesar tænastur enn at innflyta tær úr útlandinum. Av hesum eru potentiali 13,2 mió. kr. í tí almenna og 35,0 mió. kr. í tí privata.

Tølini fyri 2009 og 2010 eru ikki til taks, men KT-felagið hevur eina ábending um, at tann privati parturin veksur, tí peningastovnarnir hava flutt stóran part av KT-tænastunum til útlandið.

2.3 Alment keyp

Talva 4. Alment keyp av KT

	2005	2006	2007	2008	2009
KT-tænastur	43.150	46.689	51.092	54.631	60.557
- gongd	1%	8%	9%	7%	11%
Útbúnaður	29.313	39.315	29.096	28.053	26.007
- gongd	23%	34%	-26%	-4%	-7%
Menning	6.338	6.919	12.284	10.054	9.076
- gongd	-13%	9%	78%	-18%	-10%
Tilsamans	78.801	92.923	92.472	92.738	95.640
- gongd	6%	18%	0%	0%	3%
Almennur partur	39%	36%	31%	32%	

Kelda: Gjaldsstovan

Talva 4 vísir gongdina í almennum KT-keypið. Hon vísir, at KT-keypið er hækkað við 21% frá 2005 til 2009. Serliga er tað KT-tænastur, sum eru hækkaðar. Tær eru hækkaðar við 40% sama tíðarskeið. Stórur vøkstur hevur verið í KT-menning frá 2005 til 2007, meðan KT-menningin er lækkað í 2008 og 2009.

Talva 5. Almennur innflutningur av KT

	2004	2005	2006	2007	2008	2009
Innfl KT-tænastur	7.242	8.917	10.662	9.539	10.498	11.161
- gongd		23%	20%	-11%	10%	6%
Innfl KT-útbúnaður	1.433	4.393	14.109	6.501	4.829	2.601
- gongd		207%	221%	-54%	-26%	-46%
Innfl KT-menning	523	183	663	2.916	2.774	1.112
- gongd		-65%	263%	340%	-5%	-60%
Tilsamans	9.198	13.494	25.434	18.955	18.101	14.874
- gongd		47%	88%	-25%	-5%	-18%

Kelda: Gjaldsstovan

Talva 5 vísir, at innflutningurin av KT vaks frá 2004 til 2006. Síðani er innflutningurin fallin, og í 2009 fall hann 18%. Tað er serliga KT-útbúnaður og KT-menning, sum eru fallin, meðan KT-tænastur hava staðið í stað.

Talva 6. Býtið millum, hvat tað almenna keypir uttanlands og í Føroyum

	2004	2005	2006	2007	2008	2009
Almennur innfl tænastur	17%	21%	23%	19%	19%	18%
Almennur innfl útbúnaður	6%	15%	36%	22%	17%	10%
Almennur innfl menning	7%	3%	10%	24%	28%	12%
Almennur innfl tilsamans	12%	17%	27%	20%	20%	16%
Alment keyp í FO tænastur	83%	79%	77%	81%	81%	82%
Alment keyp í FO útbúnaður	94%	85%	64%	78%	83%	90%
Alment keyp í FO menning	93%	97%	90%	76%	72%	88%
Alment keyp í FO tilsamans	88%	83%	73%	80%	80%	84%

Kelda: Gjaldsstovan

Talva 6 vísir, at tað almenna keypir meginpartin í Føroyum, meðan ein minni partur verður innfluttur. Meira enn 80% av keypinum er í Føroyum. Tó er tað mest keypt av útbúnaði í Føroyum, meðan tað verður keypt lutfalsliga minni av tænastu og menning. Um vit flokka tænastur og menning saman, verður keypt fyri áleið 18% av tí uttanlands, meðan 82% verður keypt í Føroyum. Av útbúnaði verður keypt 10% uttanlands, meðan 90% verður keypt í Føroyum.

Eftir eina gjøgnumgongd av almenna keypsatburðinum, ber til at staðfesta, at nógv tann størsti parturin av KT verður keypt í Føroyum. Føroyski KT-veitarar eiga meira enn 80% av almenna marknaðinum.

Eingin hagtøl finnast fyri privata geiran, men tey kunnu verða útleidd úr samlaðu tølunum, sum víst omanfyri. Tey vísa, at tað privata økir keypið úr útlandinum. Tó eru hagtølini bert fram til og við 2008, og tí vita vit ikki, hvussu gongdin hevur verið síðani. Neyðugt hevur tí verið at skaffa hagtøl fyri privata keypsatburðin í Føroyum. Hetta merkir, at spurnarkanning hevur verið gjørd millum privatar føroyskar KT-keyparar.

3. Spurnarkanning

Ein spurnarkanning varð send almennum stovnum og stórum føroyskum fyritøkum. Spurnarblaðið er viðlagt sum fylgiskjal.

Spurnarblaðið var býtt í tvey. Fyrri parturin var um, hvussu nógv stovnurin/fyritøkan hevði keypt av KT, býtt upp í hardware, software, tænastur og menning býtt í ávikavist keypt frá føroyskum veitara ella útlendskum veitara seinastu 5 árini. Hetta fyri at staðfesta, um broyting er í mynstrinum fyri innflutning av KT og KT keypt í Føroyum.

Seinni parturin var um, hvørjar eginleikar stovnar og fyritøkur virðisseta hjá einum KT-veitara, og hvussu føroyska KT-vinnan klárar seg á hesum øki.

Send vóru 28 spurnarbløð og innkomu 8 spurnarbløð ella 29%. Fýra almennir stovnar svaraðu, trý tænastuvirkir og ein peningastovnur. Eingin kommuna svaraði, einki tryggingarfelag, einki framleiðsluvirki og heldur ikki samskiftisvinnan svaraði. Undirtøkan var tí løk. Rykt varð 3 ferðir eftir svari.

Spurnarbløðini, sum komu inn, svara til áleið 52 mió. kr. av samlaða KT-marknaðinum í Føroyum ella 18%. Hetta gevur tí eina ábending um gongdina, tó skulu hagtølini takast við størsta fyrivarni, tí 82% av marknaðinum er ikki umboðaði, og úrtøkan av spurnarbløðum er ikki umboðandi øll segmentir og heldur ikki nóg stórt tal innan hvørt segment til, at kanningin er representativ. Niðanfyri eru hagtølini frá spurnarbløðunum.

3.1 Hagtøl fyri KT-nýtslu

Talva 7. Keyp av KT tilsamans. í kr.

	2005	2006	2007	2008	2009
Tilsamans	25.090.779	29.575.126	40.374.950	52.136.720	52.524.294
Hardware	5.147.635	6.521.138	8.439.838	8.281.923	8.359.682
Software	3.624.573	2.789.600	3.711.620	8.283.596	6.507.091
Tænastur	9.443.719	10.674.872	13.383.669	14.988.496	18.141.481
Menning	6.874.852	9.589.516	14.839.823	20.582.705	19.516.040

Kelda: spurnarbløð kanning KT-felagið 2011

Talva 7 vísir, at stórur vøkstur hevur verið á KT-marknaðinum frá 2005 til og við 2008. Hann er vaksin ímillum 18% og 29% um árið hesi árini. Vøkstur hevur verið innan øll økir. Tað sveiggjar frá ári til árs, men gjøgnumgangandi er vøkstur í øllum segmentunum.

Talva 8. Føroyskt keyp tilsamans í kr.

	2005	2006	2007	2008	2009
Tilsamans	19.771.979	22.702.629	31.635.938	43.320.385	43.616.114
Hardware	5.075.765	6.292.922	7.276.452	7.517.806	7.962.222
Software	3.399.839	2.638.276	3.480.243	6.760.036	4.808.149
Tænastur	4.980.055	5.207.646	6.592.701	9.014.748	11.865.127
Menning	6.316.320	8.563.785	14.286.542	20.027.795	18.980.616

Kelda: spurnarbløð kanning KT-felagið 2011

Talva 8 omanfyri vísir, at størri vøkstur er í keypi frá føroyskum veitarum hetta tíðarskeiðið, enn keypt er frá útlendskum veitarum, sum talva 9 niðanfyri vísur.

Talva 9. Keyp úr útlandinum tilsamans

	2005	2006	2007	2008	2009
Tilsamans	5.318.800	6.872.497	8.739.012	8.816.335	8.908.180
Hardware	71.870	228.216	1.163.386	764.117	397.460
Software	224.734	151.324	231.377	1.523.560	1.698.942
Tænastur	4.463.664	5.467.226	6.790.968	5.973.748	6.276.354
Menning	558.532	1.025.731	553.281	554.910	535.424

Kelda: spurnarbløð kanning KT-felagið 2011

Burtursæð frá 2006 er vøksturin í 2007 og 2008 nógv størri frá føroyskum veitarum enn útlendskum veitarum. Eisini er talan um, at 43,3 mió. kr er keypt í 2008 frá føroyskum veitara, meðan bert 8,8 mió kr. er keypt frá útlendskum veitarum.

Av hardware, software og menning er nógv tað mesta keypt frá føroyskum veitara í mun til útlendskum veitara. Viðvíkjandi tænastum er tað javnari býtt. Til dømis eru í

2008 6 mió. kr. keyptar av tænastum uttanlands, meðan 9 mió. kr. eru keyptar av tænastum í Føroyum. Samanumtikið ber til at siga, at tað er vøkstur bæði í keypi av KT í Føroyum og uttanlands.

3.1.1 Hagtøl fyri privata KT-nýtslu

Niðanfyri eru hagtøl fyri privatu nýtsluna sambært spurnarbløðunum.

Talva 10. Keyp privati geirin í Føroyum

	2005	2006	2007	2008	2009
Tilsamans	16.165.024	18.817.506	26.370.769	28.540.072	29.706.622
Hardware	3.821.253	4.083.531	4.094.452	2.031.093	3.303.724
Software	2.289.866	1.974.997	2.646.243	3.390.519	2.811.912
Tænastur	3.737.585	4.195.193	5.343.532	5.182.665	5.986.370
Menning	6.316.320	8.563.785	14.286.542	17.935.795	17.604.616

Kelda: spurnarbløð kanning KT-felagið 2011

Talva 11. Keyp privati geirin úr útlandinum.

Privat	2005	2006	2007	2008	2009
Tilsamans	4.696.065	5.702.385	6.900.375	6.184.629	6.506.816
Hardware	71.870	65.565	37.423	18.221	81.341
Software	219.734	151.324	231.377	227.839	226.165
Tænastur	4.359.461	5.434.696	6.565.775	5.824.569	6.087.710
Menning	45.000	50.800	65.800	114.000	111.600

Kelda: spurnarbløð kanning KT-felagið 2011

Talvur 10 og 11 omanfyri vísa ávikavist keyp hjá privatu vinnuni í Føroyum og uttanlands. Sigast kann, at nógv tann størsti parturin er keyptur í Føroyum, og serliga tá talan er um menning, er bert ein viðfáningur keyptur uttanlands. Lesarin skal býta merkið í, at eingin vøkstur hevur verið í innflutningi av KT síðani 2007. Tó eru fleiri tænastur keyptar uttanlands enn í Føroyum.

Tænastuparturin er tað, sum hevur áhuga fyri KT-vinnuna, tí tænastuparturin kundi eins væl verið keyptur frá føroyskum veitara. Talvurnar 10 og 11 vísa, at størri parturin av tænastunum hjá privata geiranum verður keyptur uttanlands.

3.1.2 Hagtøl fyri almenna KT-nýtslu

Talva 12. Keyp almenni geirin í Føroyum

	2005	2006	2007	2008	2009	2010
Tilsamans	3.606.955	3.885.123	5.265.169	14.780.313	13.909.492	14.303.036
Hardware	1.254.512	2.209.391	3.182.000	5.486.713	4.658.498	2.966.519
Software	1.109.973	663.279	834.000	3.369.517	1.996.237	1.394.564
Tænastur	1.242.470	1.012.453	1.249.169	3.832.083	5.878.757	7.549.953
Menning	-	-	-	2.092.000	1.376.000	2.392.000

Kelda: spurnarbløð kanning KT-felagið 2011

Talva 13. Keyp almenni geirin úr útlandinum

Alment	2005	2006	2007	2008	2009	2010
Tilsamans	622.735	1.170.112	1.838.637	2.631.706	2.401.364	3.083.771
Hardware	-	162.651	1.125.963	745.896	316.119	116.470
Software	5.000	-	-	1.295.721	1.472.777	2.229.696
Tænastur	104.203	32.530	225.193	149.179	188.644	332.154
Menning	513.532	974.931	487.481	440.910	423.824	405.451

Kelda: spurnarbløð kanning KT-felagið 2011

Tað almenna keypir fyri tað mesta føroyskt. Tað sæst í talvu 12 omanfyri, at í 2010 keypti tað almenna fyri 14,3 mió. kr. ella gott 82%, meðan bert 3,1 mió. kr vóru keypt úr útlandinum. Talva 12 vísir eisini, at eitt stórt lop í innkeypið var frá 2007 til 2008, har keypið næstan trífaldaðist. Talva 13 omanfyri vísur, at bert 18% av tí almenna verður keypt uttanlands. Tó skal býtast merki í, at ein lutfalsliga stórur partur av software er keypt úr útlandinum frá 2008 til 2010.

4. KT-keypsatburður

Í frágreiðingini frá 2007 kom KT-felagið við tí uppáhaldi, at privatar føroyskar fyritøkur keypa fyri tað mesta føroyskt, meðan tað almenna hevur ein øðrvísi keypsatburð, sum keypir føroyskt, men eisini útlendskt. Tað almenna keypir hardware og netverk frá føroyingum, men KST-loysnir úr útlondum - skipanir og mannagongdir og harvið konsulentar uttaníframá.

Hagtølini lýst frammanfyri vísa, at so er ikki. Tað almenna keypir lutfalsliga meira føroyskt enn tað privata. Øking var í innflutningi av KT í 2005 og 2006, men er síðani lækkað til gagns fyri føroyska KT-vinnu.

Privati geirin keypir meira útlendskt enn tað almenna. Vøksturin hevur eisini verið stórur frá 2005 til 2008, har innflutningurin meira enn tvífaldaðist. Eisini vísa spurnarbløðini, at fleiri KT-tænastur verða keyptar uttanlands enn í Føroyum.

Væntandi er, at innflutningurin av KT-tænastum er vaksin, síðani føroyskir peninga-stovnar útveittu KT-tænasturnar til Danmarkar. Hetta kunnu vit ikki staðfesta í hagtølunum, tí eingi hagtøl eru tøk fyri 2010. Tí er tað áhugavert at hyggja júst eftir tí um eitt ár, tá hesi tøl vónandi eru tøk.

4.1 Stimbrandi eftirspurningur

Vinnuumhvørvið, har KT-vinnan búleikast, skal gerast betri og meiri stimbrandi. Ein treyt er, at útbúgvingarstøðið í Føroyum er gott, soleiðis at KT-vinnan hevur neyðuga førleikan, sum skal til. Neyðugt er at klekja KT-frøðingar í Føroyum fyri at stimbra KT-vinnuna. Hetta málið er partvíst rokkið við tí útbúgving, sum nú er á Fróðskaparsetrinum.

Tó fer ein stór íløga í KT-útbúgving á Fróðskaparsetrinum ikki at geva avkast uttan so, at keyparin eftirspyr høgan førleika í KT-vinnuni. Og tað førir til hin grundarsteinin undir einum góðum vinnuumhvørvi, nevniliga stimbrandi eftirspurningur bæði frá tí almenna og tí privata geiranum. Hetta merkir, at føroyskir stovnar og fyritøkur helst skulu keypa føroyskar KT-loysnir.

Tað hevur týdning, at politiski myndugleikin stimbrar serligan eftirspurning við at seta hóskandi regulerandi standardir. Um marknaðurin keypir frá føroyskum veitarum er møguleiki fyri, at ein serlig KT-loysn verður skapt, sum er so einastandandi, at hon kann seljast til onnur lond og við tí økist útflutningurin. Fyri at KT-vinnan kann skapa eina slíka loysn, sum kann útflytast, er neyðugt, at hon fær loyvi til at menna seg saman við kræsnum keyparum í Føroyum. Á henda hátt fáa vit unikk úrslit, sum vit hava sæð fyrr, t.d. føroyska skattaskipanin.

Tað almenna hevur skrivað nýggjan innkeyps- og útbjóðingarpolitikk og hevur tí amboðið til at gjøgnumføra regulerandi standardir, sum bæði høvdu stimbrað KT-nýtsluna og KT-vinnuna í Føroyum.

Í Føroyum eru bara smáar og miðalstórar KT-fyritøkur og á marknaðum, har smáar og miðalstórar fyritøkur skapa kappingina, eigur innkeypspolitikkurin at taka hædd fyri, at hesar fáa veruligan møguleika at vera við.

Hetta merkir, at stórar verkætlanir skulu býtast upp í partar, so smáar og miðalstórar fyritøkur megna at vera við at bjóða. Býtt kann vera eftir nøgd, landafrøði og vørubólkum.

Tað hevur stóran týdning fyri smáar og miðalstórar fyritøkur, at arbeiðið við at geva eitt boð ikki er ov krevjandi, tí hesar fyritøkur hava ikki so rúgvusmikið starvsfólkatilfeingi at ráa yvir. Tað at geva boð skal vera einfalt og kostnaðarlágt. Eisini skal vera møguligt at bjóða í samstarvi við aðrar fyritøkur.

Tað almenna skal innføra eina skipaða mannagongd, har tørvurin verður væl lýstur, áðrenn farið verður at velja veitara, soleiðis at føroyska KT-vinnan hevur møguleika at bjóða og vera við.

KT-felagið mælir til sum meginreglu, at nýggjar føroyskar KT-skipanir vera bjóðaðar út, eitt nú at tær vera bjóðaðar út í bitum, so allar KT-fyritøkur kunnu vera við.

Sum meginreglu eigur tað almenna at brúka føroyskar KT-fyritøkur sum høvðusveitarar til sínar uppgávur. Um ein útlendsk fyritøka fær eina almenna KT-uppgávu, eigur tað almenna at seta sum meginreglu, at føroyskir undirveitar vera brúktir fyri áhaldandi at førleikamenna føroyska KT-vinnu.

5. KST-tyssi

Føroyska KST-vinnan hevur konsoliderað seg nógv síðstu árini. Eitt av tilmælunum í seinastu frágreiðing var, at vinnan átti at samstarva meira fyri at styrkja um tænastuna. Hetta er júst tað, sum hent er. Serliga er tað KT-vinnan, sum hevur skipað seg. Í dag eru bert 5 fyritøkur, sum standa fyri 96% av KST-vinnuni. Niðanfyri er virðisskapanin í KST-vinnuni.

Talva 14. Virðisskapan í KST-vinnuni. í 1.000 kr

Ár	2002	2005	2008	2009
Virðisskapan	306.408	330.300	356.820	323.973
Gongd		8%	8%	-9%

Kelda: Vinnuvitan.biz

Talva 14 vísir, at virðisskapanin er hækkað úr 330 milliónum uppí 357 mió. kr. í 2008. Í 2009 fall virðisskapanin við 9%. Orsøkin til virðislækkanina er kanska torfør at áseta, tí um hugt verður eftir virðisskapanini fyri størstu fyritøkurnar, so hækka onkrar og aðrar lækka. Niðanfyri er bygnaðurin í KST-vinnuni.

Talva 15. Býtið av virðisskapan í 2008 og 2009.

	2008	2009	Broyting
Føroya Tele	177.928	143.937	-19%
Elektron	59.231	60.572	2%
Nema	52.714	44.442	-16%
Formula	26.119	37.053	42%
Vodafone	26.653	23.429	-12%
Onnur	14.175	14.540	3%

Kelda: Vinnuvitan. biz

Talva 15 vísir, at Føroya Tele er lækkað við 19%. Somuleiðis er Nema og Vodafone lækkað í virðisskapan, meðan Formula er hækkað rættiliga fitt.

Talva 16. Býtið eftir stødd í KST-vinnuni

Fyritøka	ár 2009	Býtið	Samanlagt
Føroya Tele	143.937	44%	44%
Elektron	60.572	19%	63%
Nema	44.442	14%	77%
Formula	37.053	11%	88%
Vodafone	23.429	7%	96%
Onnur	14.540	4%	100%
Tilsamans	323.973	100%	

Kelda: Vinnuvitan.biz

Talva 17. Býtið eftir stødd í samskiftisvinnuni

Samskifti	ár 2009	Býtið	Samanlagt
Føroya Tele	143.937	86%	86%
Vodafone	23.429	14%	100%
Tilsamans	167.366	100%	

Kelda: Vinnuvitan.biz

Talva 18. Býtið eftir stødd í KT-vinnuni

KT	ár 2009	Býtið	Samanlagt
Elektron	60.572	39%	39%
Nema	44.442	28%	67%
Formula	37.053	24%	91%
Onnur	14.540	9%	100%

Kelda: Vinnuvitan.biz

Talvurnar omanfyri vísa býtið eftir stødd. Føroya Tele er nógv størsta fyritøka á KST-marknaðinum, og 5 tær størstu fyritøkurnar standa fyri 96% av marknaðinum. Í samskiftisvinnuni eru bara 2 fyritøkur, har Føroya Tele stendur fyri 86% og Vodafone fyri

14%. Á KT-marknaðinum er hend ein stór konsentratión. Elektron, Nema og Formula standa nú fyri 91% av KT vinnuni.

Eitt uppáhald hevur verið, at innkeyparar ikki keypa føroyskt, tí føroysku fyritøkurnar eru ov smáar og spjaddar. Seinasta broytingin á marknaðinum við, at fyritøkur eru samanlagdar ella uppkeyptar førir við sær, at tær eru størri og betri fyri at veita KT-marknaðinum eina dygga tænastu.

Tá konsentratónin er so stór, at heilt fá virkir sita á øllum marknaðinum, er grundarlag fyri at skapa eitt tyssi í Føroyum. Tekin eru um, at KST-tyssið longu er við at forma seg, tí fyritøkur innan KT arbeiða saman samtíðis við, at Fróðskaparsetrið er farið undir KT-útbúgvingar. So er spurningurin, hvat er tað fyri eitt tyssi, sum er við at spretta.

Í øðrum londum hava tyssir sprottið úr heilt serligum staðbundnum eftirspurningi, sum ikki finst aðrastaðni. Í tyssinum er so ein serligur staðbundin førleiki skaptur júst til at nøkta hendan serliga tørv.

Í Føroyum ber kanska til at skapa eitt tyssi, sum hevur høgan førleika at framleiða einastandandi KT tænastur til lítil lond ella avmarkaðar geografiskar eindir.

Tyssir (clusters) eru bólkar av samanhangandi fyritøkum, so sum veitarum, tænastufyritøkum og stovnum á einum ávísum øki. Hetta kann vera galdandi fyri føroyska KST-vinnu, har Føroyar hava fyritøkur, sum kunnu veita eina serliga tænastu, og kundar, sum hava ein serligan tørv.

Fyrst av øllum er hetta tyssið landafrøðiliga avmarkað. Til ber at siga, at eftirspurningurin frá tí almenna og stórum føroyskum fyritøkum er óvanligur, tí hesir stovnar og hesar fyritøkur búleikast í einum sera lítlum segmenti, sum eitur Føroyar við bert áleið 50.000 íbúgvum.

Útbúgving á Fróðskaparsetrinum saman við gransking klekir gott starvsfólk og góð hugskot til tyssið at nýta gott av. Hesir kundar, framleiðarar og klekingarstovnar vera við tíðini tengdir at hvørjum øðrum og sínámillum ávirkaðir við sínum serligu kjarnuførleikum og stuðulsførleikum.

Tyssir hava tann eginleika, at tey økja um produktivitetin hjá einstøku virkjunum. Virkini hava betri atgongd til veitarar, starvsfólk og vitan, enn um tey ikki vóru partur av einum tyssi. Og ikki minst økir eitt tyssi møguleikan fyri innovatión.

Um ein útlendingur fær eina almenna KT-uppgávu, sum nevnt omanfyri, har tað almenna hevur sett sum krav, at føroyskir undirveitarar skulu veljast, kann tyssið brúkast. Hetta merkir, at KT-vinnan skal samstarva fyri at megna at vera undirveitari til útlendskar KT-skipanir í Føroyum.

KT–felagið mælir til, at tættari samstarv fæst millum stórar KST-keyparar, Fróðskaparsetrið og KST vinnuna við tí í hyggju at fáa skapt tyssuførleika innan júst hesa vinnu.

KT-vinnan hevur eina støtt í dag, sum kann vera eitt eyka bein hjá føroyska búskapinum at standa á. Hon kann gerast ein vakstrarvinna, sum skapar búskapar-vøkstur og íverksetan/innovatión.

Hetta kann vera orsøkin til, at fólk við góðum útbúgvingum og høgum førleika flyta heim til Føroya. Við hesum økist fólkatalið í Føroyum og harvið virðisskapanin og livistøðið.

6. Keldur

Roknskapir. Vinnuvitan.biz.

Hagtøl. Gjaldsstovan

Hagtøl. Hagstova Føroya

Ársroknskapur. Elektron P/F

Uppskot til innkeyps- og útboðspolitikk, VMR, 2011.

Analyse af barrierer for konkurrenceudsættelse i den offentlige sektor, Udbudsrådet Nyropsgade 30, København. 2010

Building the Microeconomic Foundations of Prosperity. Michael E. Porter, Harvard University

Effektivt offentligt indkøb. Konkurrenceanalyse 03/2010. Konkurrence- og forbrugerstyrelsen, Nyropsgade 30, København. September 2010.

Konkurrencestyrelsens vejledning til udbudsdirektiverne. Konkurrencestyrelsen. 2006

Skrivað frágreiðingina hevur Hans Jákup Mikkelsen, Heygsgerði 2, FO-100 Tórshavn

7. Fylgiskjal

Spurnarblað

viðvíkjandi keypi av KT

Spurnarblaðið er liður í arbeiðnum hjá KT-felagnum at leggja eina strategi fyri føroysku KST-vinnuna. Spurnarblaðið er sent stórum keyparum av KT í Føroyum.

Ætlanin við spurnarblaðnum er at kortleggja føroyska eftirspurningin eftir KT. Spurnarblaðið skal innsavna hagtøl fyri KT-nýtslu í Føroyum. Hugt verður eftir býtinum millum alment og privat, og býtið millum føroyska framleiðslu og innflutning. Eisini roynir spurnarblaðið at eyðmerkja, hvørjar eginleikar ein føroyskur KT-veitari skal hava fyri at vera ein góður veitari til føroyskar keyparar. Svarið verður viðgjørt í trúnaði.

Vinarliga send spurnarblaðið innaftur, sum vanligt bræv skjótast gjørligt – helst innan 15. apríl 2011. Við hesari mannagongd ber ikki til at spora, hvør hevur svarað.

Vinarliga send spurnarblaðið til:

Vinnuhúsið
Smærugøta 9A
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn
Att: Gordon Rajani

Eisini ber til at senda spurnarblaðið á: gordon@industry.fo

---

1. Vinarliga eyðmerk hvørjum bólki fyritøka/stovnur tín er í (set kross)	Kross
Tað almenna	
Kommuna	
Peningarstovnur	
Tryggingarfelag	
Samskiftisvinna	
Framleiðsluvirki	
Tænastuvirki	

2.Vinarliga fyll talvuna niðanfyri við tølum fyri keyp av KT býtt uppá ár. Tølini eru fyri tað, sum er keypt frá føroyskum veitarum. Tølini skulu vera í virði. Vinarliga být tølini uppí fylgjandi bólkar eisini.

Frá føroyskum veitara: (virði)						
KT-keyp	2005	2006	2007	2008	2009	2010
Tilsamans						
Hardware						
Software						
Tænastur						
Menning						

3.Vinarliga fyll talvuna niðanfyri við tølum fyri keyp av KT býtt uppá ár. Tølini eru fyri tað, sum er keypt úr útlondum. Tølini skulu vera í virði. Tølini skulu býtast á sama hátt sum omanfyri.

Frá útlendskum veitara: (virði)						
KT-keyp	2005	2006	2007	2008	2009	2010
Tilsamans						
Hardware						
Software						
Tænastur						
Menning						

4. Niðanfyri eru eginleikar, sum KT-veitari verður mettur eftir. Vinarliga raðfest eginleikarnar, har tú setir 1 fyri tann tú heldur hevur størst týdning og 2 fyri næststørsta týdning o.s.v.	Raðfest
Førleiki	
Trúvirði	
Royndir	
Loysnir/Tilvísingar/Søga	
Stødd	
Útbúgvingarstøði	
Certificeringar	
Kostnaður	
Veitingartrygd	
Annað (skriva hvat):	

5. Met um, hvussu føroyska KT-vinnan klárar seg í ymsu eginleikunum. (Set kross)	Sera gott	Gott	Miðal	Minni gott	vánaligt
Førleiki					
Trúvirði					
Royndir					
Loysnir/Tilvísingar/Søga					
Stødd					
Útbúgvingarstøði					
Certificeringar					
Kostnaður					
Veitingartrygd					
Annað (skriva hvat):					

Stóra takk fyri!